# Fróðskaparsetur Føroya

HÁLVÁRLIG METING AV PH.D.-LESTRI
Kunngerð nr. 63 frá 24. mai 2016 um philosophiae doctor-útbúgving á Fróðskaparsetri Føroya (Ph.d.-kunngerðin)

DEILD:

Meting nr. ___ fyri tíðarskeiðið ______________________ tilmeldingarnr. _____________

| | |
|---|---|
| Navn: | |
| Bústaður: | |
| Tlf: | T-adressa: |
| Farin undir ph.d.-lesturin: | Verður liðug/ur: |
| Ph.d.-lestrartíðin er longd ___ mánaðir vegna:<br><br>barnsburð: sjúku: annað: | |
| Heiti á verkætlan: | |
| Leiðbeinarar:<br><br>Høvuðsleiðbeinari:<br>Aðrir leiðbeinarar: | |

1.

| |
|---|
| Lestraræltan er áður góðkend:<br><br>Er hon broytt?<br><br>Nei:<br>Ja: Um ja, greið frá: |

Er verkætlanin broytt?

Nei:

Ja: Um ja, greið frá:

2.

Frágreiðing um gongdina í ph.d.-ætlanini í metingartíðarskeiðinum:

3.

Heldur tíðarætlanin?

Ja: Nei: Um nei, greið frá:

4.

Undirvísing í metingartíðarskeiðinum:

Skeið – heiti – stig – ECTS

Tímar til samans í hesi lestrarhálvu:

Tímar til samans í undanfarnum lestrarhálvum:

Undirvísingartímatal til samans:

VEGLEIÐARIN:

Eru avrikini nøktandi?
Ja: Nei:

5.

Luttøka á ph.d.-skeiðum:

Váttanir um skeiðsluttøku skulu leggjast við.

VEGLEIÐARIN:

Eru avrikini nøktandi?
Ja: Nei:

6.

Vísindaligt kunningarvirksemi í metingartíðarskeiðinum:

Fakligar ráðstevnur, verkstovur o.tíl. við framløgu:

Fólkslig kunning:

VEGLEIÐARIN:

Eru avrikini nøktandi?
Ja: Nei:

7.

Uttanlandsvist:

8.

Eru trupulleikar í lestrinum?

Ja: Nei:

Um ja: ph.d.-lesandi og vegleiðari greiða frá í fylgiskjali.

9.

| | |
|---|---|
| dagfesting | undirskrift hjá ph.d.-studentinum |

Undirritaði høvuðsleiðbeinari metir, at gongdin í ph.d.-lestrinum hevur verið nøktandi í metingartíðarskeiðinum, og mælir tí til, at lesturin heldur fram. Samstundis verður váttað, at studenturin hevur verið virkin soleiðis sum sagt er frá frammanfyri.

| | |
|---|---|
| dagfesting | undirskrift hjá høvuðsleiðbeinara |

Undirritaði dekanur er kunnaður um hesa hálvárligu meting

| | |
|---|---|
| dagfesting | undirskrift hjá dekani |

# LEIÐBEINING TIL OYÐUBLAÐ UM HÁLVÁRLIGA METING AV PH.D.-LESTRI

MANNAGONGD
Hvørt hálva ár skal høvuðsleiðbeinarin taka støðu til um granskaraútbúgvingin hjá ph.d.-studentinum fer fram á nøktandi hátt og um hon samsvarar við lestrarætlanina. Metingin skal hava fyrilit fyri sjúku, barnsburði og øðrum skjalprógvaðum forfalli.

Høvuðsleiðbeinarin tekur stig til og stendur fyri hálvárligu metingunum, sum verða gjørdar samsvarandi dagfestingunum í skjalinum *Váttan um innskriving*. Er úrslitið av metingini, at granskaraútbúgvingin ikki gongur sum ætlað, skal høvuðsleiðbeinarin alt fyri eitt gera dekanin varan við hetta. Dekanurin tekur støðu til, hvørt granskaraútbúgvingin skal steðga ella verða beind aftur á rætta leið.

Høvuðsleiðbeinarin, ph.d.-studenturin og dekanurin skriva undir metingarskjalið og lata Journalini á Fróðskaparsetrinum tað til skráseting beinanvegin. Høvuðsleiðbeinarin og dekanurin hava ábyrgdina av, at freistirnar fyri innlatingum av metingarskjalinum verða hildnar. Dekanurin hevur ábyrgd av at metingarskjalið verður skrásett í Journalini við undirskrift frá øllum trimum pørtum. Tá ið metingin er skrásett, fáa ph.d.-studenturin og leiðbeinararnir avrit av skjalinum.

TEIGARNIR Á OYÐUBLAÐNUM
1. Lestrarætlanin og verkætlanin
Lestrarætlanin og verkætlanin verða vanliga góðkend í sambandi við innskrivingina til lesturin. Endalig verk- og lestrar- og tíðarætlan skulu vera góðkendar í seinasta lagi í fyrstu hálvárligu metingini. Koma  seinni broytingar fyri, skulu tær verða góðkendar fyrstu ferð, meting kemur fyri eftir tað.

Um so er at upprunaliga lestrarætlanin og/ella verkætlanin er broytt, skal greiðast frá broytingunum og orsakunum til broytingarnar. Avleiðingarnar fyri verkætlanina skulu verða lýstar.

Endurskoðað lestrarætlan og endurskoðað verkætlan skulu leggjast við til góðkenningar.

2. Frágreiðing um gongdina í metingartíðarskeiðinum
Greitt verður frá rannsóknararbeiðinum í metingartíðarskeiðinum.

3. Tíðarætlan
Sambært kunngerðini fyri ph.d.-lestur er lestrartíðin trý ár og umfatar skeið, undirvísing, uttanlandsvist og sjálvstøðugt rannsóknararbeiði. Eru broytingar, skal greiðast frá, hví so er.

4. Undirvísing
Sagt skal vera frá, hvørjum ph.d.-studenturin hevur undirvíst í, og hvussu nógvar tímar undirvíst er. Undirvísingartímar undanfarnar lestrarhálvur verða taldir saman við tímarnar í hesum metingartíðarskeiðinum. Vegleiðarin váttar, um undirvísingin hevur verið nøktandi.

5. Skeið
Her skrivar ph.d.-studenturin tey ph.d.-skeiðini, sum hon/hann hevur tikið – heiti og ECTS.

Váttan um staðin skeið skal fylgja við metingini. Allar skeiðsváttanir verða skrásettar í próvbókini. Vegleiðarin váttar, um skeiðsluttøkan hevur verið nøktandi.

6. Vísindaligt kunningarvirksemi
Greitt verður frá kunnandi avrikum av vísindaligum slag í metingartíðarskeiðinum. Luttøka á seminarum, ráðstevnum o.t., sum ph.d.-studenturin hevur verið til í metingartíðarskeiðinum, verða nevnd. Upplýst verður somuleiðis um fólksliga kunning um vísindaavrik. Vegleiðarin váttar, um kunningin hevur verið nøktandi.

7. Uttanlandsvist
Tá ið uttanlandsvistin (kunngerðin §3, stk. 3) er av, greiðir ph.d.-studenturin frá vistini – hvat hon/hann hevur gjørt, hvørji sambond eru knýtt o.a.t.

Um ph.d.-studenturin sbrt. seinastu hálvársmeting í útbúgvingini enn ikki hevur vistast á øðrum universiteti ella granskingarstovni, skal verða greitt frá, hví so er. Høvuðsvegleiðarin skal taka støðu til, um grundgevingin og tað, ið er gjørt í staðin, eru nøktandi.

8. Trupulleikar í lestrinum
Eru trupulleikar í lestrinum, skulu verða teir verða lýstir.

9. Undirskriftir
Um høvuðsleiðbeinarin metir, at gongdin í ph.d.-lestrinum ikki er nøktandi og tí ikki kann skriva undir í hesum teigi, skal hann greiða dekaninum frá orsøkini í fylgiskjali, ið ph.d.-studenturin fær til viðmerkingar.